# P/F VÁGATUNNILIN

## TÓRSHAVN

## ÁRSROKNSKAPUR

## 2003

**(5. ROKNSKAPARÁR)**

**AVRIT**

**INNIHALDSYVIRLIT**

Síða


Upplýsingar um felagið ........ 2

Ársfrágreiðing ........ 3 - 4

Roknskaparátekning ........ 5

Grannskoðanarátekning ........ 5

Nýttur roknskaparháttur ........ 6 - 7

Rakstrarroknskapur 2003 ........ 8

Fíggjarstøða pr. 31. desember 2003 ........ 9 - 10

Gjaldførisfrágreiðing 2003 ........ 11

Notur ........ 12 - 14

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Vágatunnilin |
| Heimstaður: | FO-100 Tórshavn |
| Skattakommuna: | Tórshavnar Kommuna |
| Stovningardagur: | 21. desember 1998 |
| Roknskaparár: | 1. januar til 31. desember |
| V-tal: | 485.209 |

**Nevndin**

Bergur í Garði, búskaparfrøðingur, Tórshavn, formaður
Jens Kári Vilhelm, verkfrøðingur, Hoyvík, næstformaður
Heri M. Hammer, verkfrøðingur, Klaksvík
Oyvindur Brimnes, verkfrøðingur, Argir
Bjarni Askham Bjarnason, búskaparfrøðingur, Tórshavn

**Stjórn**

David Reinert Hansen, verkfrøðingur, Oyri, stjóri

**Fíggjarleiðari**

Reinhold Isaksen, búskaparfrøðingur, Norðragøta

**Grannskoðan**

P/F Grannskoðaravirkið ***INPACT***
statsaut. revisorar
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Tlf.: 31 47 00 - Fax: 31 38 15
T-postur: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

Ársroknskapurin 2003 er góðkendur á felagsins aðalfundi, hin 21. juni 2004.

__________________________
fundarstjóri

## ÁRSFRÁGREIÐING 2003

**Virksemi**
Endamál felagsins er at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur og fasta sambandið um hendi, umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið. Felagsins virksemi í farna ári hevur í høvuðsheitum verið rakstur av innkrevjingarskipan og tunli, at hava eftirlit við byggiarbeiðinum, fyrireika tilbúgvingarætlan og gera byggiarbeiðið liðugt. Undirsjóvartunnilin varð latin upp fyri almennari ferðslu 10. desember 2002.

**Lógargrundarlag**
Partafelagið varð stovnað við 20,3 mió.kr. í løgujáttan á fíggjarløgtingslógini og eykajáttanarlógini fyri 1998. Ognarrættur, eftirlit, peningajáttan 160,3 mió.kr., krøv til felagið, nýtslugjøld, ognartøka, skattlig viðurskifti, eftiransing og kunning verða formaliserað í Ll. nr. 6 frá 08.02-2000 (Anleggslógin) um "fast samband um Vestmannasund".

**Fíggjarliga gongdin**
Við munandi størri ferðslu enn roknað varð við (í miðal umleið 880 akfør/dag í mun til mett umleið 400), gjørdist umsetningurin størri enn væntað. Kostnaðurin til vanliga raksturin gjørdist á leið sum mett, men tó gjørdist kostnaðurin til eftiransing á gjaldstøðini og uppfylging í sambandi við áhaldandi innkoyringartrupulleikar av gjaldskipanini, størri enn væntað.

Í tráð við anleggslógina er avgjørt, at tunnilin verður avskrivaður yvir lánitíðina til avhendigarvirði 160,3 mió.kr. ið svarar til samlaða innskotspeningin hjá landstýrinum. Hetta setur krøv til avskrivingarháttin, og eru hetta fortreytir fyri langtíðarætlanini fram til lánið er afturgoldið. Við støði í hesum verður roknað við einum halli eftir avskrivingar tey fyrstu árini.

**Menningarkostnaður**
Felagið hevur havt ávísan kostnað til at broyta viðtøkur við partapeningshækking, kunnandi tiltøk og tilfar.

**Íløgur**
Felagið hevur í árinum gjørt íløgur fyri 28,7 mió.kr. í arbeiðið uppá sjálvan undirsjóvartunnilin við tilhoyrandi vegum, brúgvum, rakstrartólum, innbúgvi og tøkni.

**Hendingar aftaná roknskaparárslok**
Frá statusdegnum og til í dag er einki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársroknskapinum. Á eykaaðalfundi tann 19. januar 2004 var partapeningurin hækkaður við 20 mió.kr. upp í 140,3 mió.kr.

**Framtíðarútlit**
Á samtyktu fíggjarløgtingslógini 2004 eru 20 mió.kr. játtaðar afturat til verkætlanina, samb. anleggslógini. Sambært lóg eru játtaðar 20 mió.kr. árliga upp til 160,3 mió.kr. í partapeningi.

Við óbroyttum prísum hevði verið roknað við heldur minni ferðslu í 2004, men við príslækkingini, sum er galdandi frá 1. mai 2004, verður roknað við, at ferðslan verður á leið tað sama, meðan inntøkurnar væntast at falla nakað.

Vanligi rakturin av felagnum væntast at verða á leið tann sami. Stig eru tikin til broytingar í innkrevjingarskipanini, so hon verður meira stabil.

**Partaeigaraviðurskifti**
Partapeningurin er kr. 120.300.000. Allur partapeningurin er ogn landsins. Í árinum er, við aðalfundarsamtykt frá 29. januar 2003, partapeningurin hækkaður við 20 mió.kr. við játtan á fíggjarløgtingslógini fyri 2003.

**Býtið av ársúrslitinum**
Ársúrslitið er **kr. -1.100.218**, ið nevndin mælir til at býta soleiðis

| | |
|---|---|
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | 409.566 |
| Ársúrslit | -1.100.218 |
| **At flyta til næsta ár** | **-690.652** |

**Eginpeningurin** verður nú **119.609.348**

**ROKNSKAPARÁTEKNING**

Ársfrágreiðing og fylgjandi ársroknskapur fyri 2003 verða løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, hin 21. juni 2004

Stjórn: David Reinert Hansen

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nevnd: | Bergur í Garði<br>formaður | Jens Kári Vilhelm<br>næstformaður | Heri M. Hammer |
| | Oyvindur Brimnes | | Bjarni Askham Bjarnason |

**GRANNSKOÐANARÁTEKNING**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Vágatunlinum, Tórshavn fyri 2003, sum leiðslan hevur sett upp.

**Grannskoðanin**
Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og framt grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi skeivleikar ella vanta týðandi upplýsingar í ársroknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og váða, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

**Fyrivarni**
Skrásetingar- og innkrevjingarskipanin fyri stakar ferðir, hevur ikki verið virkin alt tíðarskeiðið. Tí er skrásetingarskipanin ikki haldgott grundarlag fyri inntøkunum. Vit taka tí fyrivarni fyri inntøkuskrásetingunum og fyri skuldarunum.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin, undantikið møguligum virknaði av omanfyri nevnda fyrivarni, er greiddur í samsvari við tey krøv, ið føroyska lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann, burtursæð frá møguligari ávirkan av omanfyri standandi viðurskiftum á ársroknskapin, gevur rætta mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Tórshavn, hin 21. juni 2004

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

| | |
|---|---|
| Jógvan Amonsson<br>statsaut. revisor | Alvi S. S. Nielsen<br>skrás. grannskoðari |

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

**Alment**
Roknskapurin er uppsettur eftir galdandi partafelags- og ársroknskaparlóg og roknskaparkunngerð. Rakstrarroknskapurin er uppsettur eftir greinbýttum frásøguhátti og fíggjarstøðan eftir kontuhátti.

**Inntøkur**
Inntøkugrundarlagið fyri ferðaseðlasølu eru beinleiðis inngjøld á innlán felagsins í føroysku peningastovnunum. Útroknað frá ultimosaldu, minus rentutilskriving, útgjøld og primosaldu. Harafturat er ein meting gjørd fyri ferðaseðlasølu, sum ikki er goldin.

Inntøkugrundarlagið fyri kubbahald eru forútgoldin inngjøld á innláni felagsins í føroysku peningastovnunum og frádrigið avseting fyri trygd fyri goldnar kubbar, rentutilskriving, útgjøld og primosaldu. Ongar tíðaravmarkingar verða gjørdar fyri kubbahaldini.

**Kostnaður**
Kostnaðurin, ið hoyrir árinum til, verður rakstrarførdur við tíðaravmarkingum.

**Rentur**
Rentuinntøkan samsvarar tilskrivaðu rentu á innlánskontum felagsins í 12 mánaða tíðarskeiðinum í árinum. Rentukostnaðurin av lánum, ið tikin eru upp, er roknaður fram til árslok, svarandi til roknskaparárið og bókaðar undir tíðaravmarkingum.

**Skattur**
Eingin skattur av ársins skattskyldugu inntøku áhvílir felagnum. Útsettur skattur verður roknaður við 20% av skattligum meiravskrivingum í mun til roknskaparligu avskrivingarnar á materiellari støðisogn í árinum og undanfarin ár. Eingin útsettur skattur áhvílir felagnum.

**Materiell støðisogn**
Vegir, brúgvar, undirsjóvartunnil, tekniskur útbúnaður, tøkni, rakstrartól og innbúgv eru tikin við til útvegnarvirði frádrigið avskrivingar. (Scrap-) avhendingarvirði sambært § 1,4 í ”Anleggslógini” er sett til 160.300.000 kr.

Fyri ógoldna partapeningin frá 01.01.2003 er renta roknað og ognarførd fram til síðsta gjald hin 01.02.2005. Hesar roknaðu rentur verða mótroknaðar í rentukostnaðinum í nevnda tíðarskeiði. Tilsamans eru renturnar kr. 3.488.333.

Tól, ið kosta minni enn kr. 20.000, verða kostnaðarførd.

Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð og restvirði (livitíð) og verða gjørdar við eins stórum árligum prosentparti. Fyrsta árið verður avskrivað frá keypsmánaðinum:

| | |
|---|---|
| Vegir og undirsjóðartunnil | 10 – 14 ár |
| Tøkniútbúnaður | 3 - 5 ár |
| Rakstrartól | 5 ár |
| Innbúgv | 10 ár |

**Áogn**
Tilgóðahavandi áogn er tikin við til áljóðandi virði. Avsett verður ímóti tapsvanda. Sera varisligar metingar eru gjørdar fyri ógoldin ferðagjøld.

**Vøru- og tænastuskuld**

Vøru- og tænastuskuld er tikin við til áljóðandi virði. Avmarkaða skuldin í fremmandum gjaldoyra er tikin upp til kurs gjaldsdagin. Kursvinningur og kurstap, bæði ásannað og ikki ásannað, eru tikin við í rakstrarroknskapinum.

**Veðhalds- og eventualskyldur**

Veðhalds- og eventualskyldur eru upplýstar og avsettar eftir neyðugum tørvi aftast í ársroknskapinum.

| RAKSTRARROKNSKAPUR 2003 | | | |
|---|---|---|---|
| | | | t.kr. |
| | Nota | 2003 | 2002 |
| **Nettosøla** | | **27.748.202** | **3.610** |
| Endurgjald, rakstrar- og fyrisitingarkostnaður | | 952.808 | 1.188 |
| Rakstrarkostnaður | | -5.362.664 | -288 |
| Fyrisitingarkostnaður | | -1.077.251 | -1.322 |
| **Bruttovinningur** | | **22.261.095** | **3.187** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -2.465.719 | -1.555 |
| Avskrivingar | 2 | -12.017.680 | -118 |
| **Úrslit, frá primerum rakstri** | | **7.777.695** | **1.514** |
| Rentuinntøkur | | 200.602 | 676 |
| Rentukostnaður | | -9.078.515 | -29 |
| **Ársúrslit** | | **-1.100.218** | **2.162** |

Býtið av ársúrslitinum sæst í ársfrágreiðingini.

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2003

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | t.kr. |
| **OGN** | Nota | 2003 | 2002 |
| Lendi, vegir og undirsjóvartunnil | | 288.282.395 | 274.749 |
| Tøkniogn | | 3.206.488 | 182 |
| Rakstrartól og innbúgv | | 547.527 | 469 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | 2 | **292.036.410** | **275.400** |
| Vøru- og tænastuáogn | | 592.817 | 386 |
| P/F Norðoyatunnilin, millumrokning | | 2.009.527 | 1.497 |
| Meirvirðisgjald | | 1.539.645 | 12.430 |
| Tíðaravmarkingar | | 8.000 | 8 |
| **Áogn tilsamans** | | **4.149.988** | **14.321** |
| Innlánspeningur | | 10.207.887 | 22.291 |
| **Peningur tilsamans** | | **10.207.887** | **22.291** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **14.357.876** | **36.612** |
| **OGN TILSAMANS** | | **306.394.286** | **312.012** |

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2003

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | t.kr. |
| **SKYLDUR** | Nota | 2003 | 2002 |
| Partapeningur | 3 | 120.300.000 | 100.300 |
| Flutt úrslit | 4 | -690.652 | 410 |
| **Eginpeningur tilsamans** | | **119.609.348** | **100.710** |
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | | 149.801.165 | 161.000 |
| **Langfreistað skuld** | 5 | **149.801.165** | **161.000** |
| Avdráttir, veðskuld næsta ár | 5 | 25.198.835 | 20.000 |
| Fallin terminsgjøld | | 1.075.608 | 0 |
| Roknað renta veðlán | | 1.336.806 | 3.480 |
| Roknað renta ógoldin partapeningur | | 1.183.333 | 0 |
| Avsett frítíðarløn | | 30.289 | 30 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 7.348.901 | 26.612 |
| Trygd, kubbar | | 810.000 | 180 |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **36.983.772** | **50.302** |
| **Skuld tilsamans** | | **186.784.937** | **211.302** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **306.394.286** | **312.012** |

| GJALDFØRISFRÁGREIÐING 2003 | | |
|---|---|---|
| | | t.kr. |
| | 2003 | 2002 |
| Úrslit, av primerum rakstri | 7.777.695 | 1.514 |
| Avsett frítíðarløn | 401 | 3 |
| Avskrivingar | 12.017.680 | 118 |
| | **19.795.776** | **1.636** |
| Broytingar í ogn í umferð | | |
| Vøru- og tænastuáogn | -719.897 | -1.863 |
| Meirvirðisgjaldsáogn | 10.890.654 | -5.198 |
| Broytingar í stuttfreistaðari skuld | | |
| Roknað renta ógoldin partapeningur | 1.183.333 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | -19.262.932 | 17.971 |
| **Gjaldførisúrslit, frá primerum rakstri** | **11.886.934** | **12.545** |
| Rentuinntøkur | 200.602 | 676 |
| Rentukostnaður | -9.078.515 | -29 |
| **Gjaldførisúrslit, frá rakstri** | **3.009.021** | **13.193** |
| Íløgur í undirsjóvartunnil | -24.609.061 | 119.834 |
| Íløgur í tøkniogn | -3.876.768 | -197 |
| Íløgur í rakstrartól og innbúgv | -168.566 | -250 |
| **Gjaldførisúrslit, eftir íløgur** | **-25.645.374** | **-107.088** |
| Teknaður partapeningur | 20.000.000 | 20.000 |
| Inngjøld, trygd, kubbar | 630.000 | 180 |
| Lántøka, Íleggingargrunnur fyri Føroyar | 175.000.000 | 98.000 |
| Umlagt byggilán, Íleggingargrunnurin | -182.067.951 | 0 |
| **Gjaldførisúrslit, eftir fígging** | **-12.083.326** | **11.092** |
| Tøkur peningur, primo | 22.291.213 | 11.199 |
| **Tøkur peningur, ultimo** | **10.207.887** | **22.291** |

## NOTUR TIL ROKNSKAPIN

| Nota 1. Starvsfólkakostnaður | 2003 | t.kr. 2002 |
|---|---|---|
| Lønir | 2.168.222 | 1.266 |
| Eftirlønir | 243.380 | 232 |
| Almenn lønargjøld | 28.647 | 42 |
| Starvsfólkakostnaður | 25.471 | 15 |
| | **2.465.719** | **1.555** |
| Harav til | | |
| Stjórn | 311.575 | 442 |
| Nevnd | 216.000 | 262 |
| Ársverk felagið hevur havt er umleið | 7,5 | 6 |

| Nota 2. Materiell støðisogn | Lendi, vegir og undirsjóvartunnil | Tøkni og maskinur | Rakstrartól og innbúgv |
|---|---|---|---|
| Virði 01.01.2003 | 274.748.622 | 302.912 | 662.777 |
| Tilgongd 2003 | 24.609.061 | 3.876.768 | 227.947 |
| Frágongd 2003 | 0 | 0 | -99.800 |
| Virði 31.12.2003 | 299.357.684 | 4.179.681 | 790.924 |
| Avskrivingar 01.01.2003 | 0 | -121.211 | -193.407 |
| Afturført avskr. frágongd 2003 | 0 | 0 | 40.419 |
| Avskrivingar 2003 | -11.075.289 | -851.982 | -90.409 |
| Avskrivingar 31.12.2003 | -11.075.289 | -973.193 | -243.396 |
| **Bókført virði 31.12.2003** | **288.282.395** | **3.206.488** | **547.527** |
| Bókført virði 31.12.2002 | 274.748.622 | 181.702 | 469.370 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | t.kr. |
| **Nota 3. Partapeningur** | | | 2003 | 2002 |
| Partapeningurin er býttur upp í hesar flokkar: | | | | |
| 1 A-partabræv á | 20.300.000 | | 20.300.000 | 20.300 |
| 5 A-partabrøv á | 20.000.000 | | 100.000.000 | 80.000 |
| | | | **120.300.000** | **100.300** |
| Øll partabrøvini hava eins rættindi. | | | | |
| **Nota 4. Eginpeningur** | | | | |
| Partapeningur | | | 120.300.000 | 100.300 |
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | | | 409.566 | -1.753 |
| Fluttur partur av úrslitinum í árinum | | | -1.100.218 | 2.162 |
| Flutt úrslit | | | -690.652 | 410 |
| **Eginpeningur tilsamans** | | | **119.609.348** | **100.710** |

| | Restskuld | Fellur | Restskuld | Restskuld |
|---|---|---|---|---|
| **Nota 5. Veðskuld** | 31.12.2003 | innan 1 ár | eftir 5 ár | 31.12.2002 |
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | **175.000.000** | **25.198.835** | **98.156.587** | **181.000** |

Við verandi lánisáttmála við árslok 2003

| **Veð- og eventualskyldur** | Veð lýst í | Veðupphædd |
|---|---|---|
| 1. Veð Skbr. Íleggingargrunnurin, | matr.nr. 401b Kvívík | 200.000.000 |
| 1. Veð Skbr. Íleggingargrunnurin, | matr.nr. 373e Sandavágur | 200.000.000 |
| 1. Veð Skbr. Íleggingargrunnurin, | leysafæ, tekninskur útbúnaður | 200.000.000 |
| | | **600.000.000** |

**Eventualskyldur**

Øll teknað hald hava rindað eina trygd á kr. 300 fyri kubban, ið fæst aftur, um kubbin verður latin inn aftur til felagið.

Felagið hevur 14. august 2002 undirskrivað ískoytisavtalu til leigusáttmála um leigu av skrivstovuhølum í Havn fram til 1. juli 2007 við 3 mánaði uppsagnartíð, tó í fyrsta lagi 1. apríl 2007.

| **Tryggingarviðurskifti** | |
|---|---|
| All Risk-trygging: | |
| Skaða á tunnil-/útgerð | 25.000.000 |
| Rakstrartap | 5.000.000 |
| Virkisábyrgdartrygging: | |
| Skaða á persón | 70.000.000 |
| Skaða á lutir | 15.000.000 |
| Ábyrgdartrygging: | |
| Ábyrgd nevnd- og stjórn pr. skaða/ár | 10.000.000 |
| Leysafætrygging: | |
| Skrivstovuinnbúgv og útgerð | 230.000 |
| Telduútgerð og tøkni | 270.000 |

Bilarnir eru ábyrgdar- og skrokktryggjaðir. Hjálparfólka- og ferðatrygging er teknað.